Løgmansskrivstovan
att. Marjun Hanusardóttir
Tinganes

Tórshavn, tann 27-10-99
J.Nr.: 1105-72/99
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: HS

Tygara skriv

# Uppskot til skipan av byggi- og bygningsumsiting

25. mai 1999 var nevnd sett at gera tilmæli um skipan av byggitekniska førleikanum í almennu fyrisitingini, og um hvar virksemið hjá landsarkitektinum í framtíðini skal vera bygnaðarliga.

Í nevndini hava verið hesi umboð:
fyri Vinnumálastýrið, Hákun Steingrímsson, formaður
fyri Løgmansskrivstovuna, Ingibjørg Berg, skrivari
fyri Fíggjarmálastýrið, Petur Alberg Lamhauge, Ole Jensen
fyri Undirvísingar- og mentamálastýrið, Rúna Hilduberg
fyri Almanna- og heilsumálastýrið, Eva Bennicke
fyri Landsverkfrøðingsstovnin, Finnleif Durhuus.

Í arbeiðssetninginum var m.a. tilskilað, at nevndin skuldi gera uppskot til, hvussu og hvar virksemið hjá arkitektinum skal skipast, so at tað fellir náttúrliga inn í viðkomandi arbeiðsøki, og kemur at virka í einum umhvørvi, sum kann veita fakligan íblástur og menning, samstundis sum virksemið sjálvt kann styrkja fakliga umhvørvið.

Sjálvur arbeiðssetningur nevndarinnar var orðaður soleiðis:
1. At finna hóskandi stað at skipa virksemið hjá núverandi landsarkitekti og byggifrøðiliga serkunnleikanum í síni heild við atliti at best møguliga gagnnýtslu av tilfeingi og serkunnleika innan økið.
2. At gera uppgávulýsing og starvsskipan serstakliga mótvegis einstøku stýrum og stovnum.
3. At greina hvørja tekniska og fíggjarliga ábyrgd og heimildir byggifrøðiligi serkunnleikin skal hava á ymisku starvsøkjunum.
4. At meta um starvsfólkatørv og kostna annars.

Eisini varð sagt, at nevndin harafturat eigur at hoyra seg um, hvussu líknandi virksemi er skipað í a fyrisitingum aðrastaðni.

Fyrstu fundirnir hjá nevndini vóru merktir av, at sera ymisk sjónarmið vóru, m.a. vóru ymiskar uppfatanir av, hvør varar av og hevur ábyrgd av landsins ognum.

Til tess at greina henda spurning varð ein fyrispurningur sendur løgdeildini har spurt var um:
- Hvør eigur og hevur ábyrgd av teim ognum, ið landið átti áðrenn stýrisskipanin varð broytt, og hvør landsstýrismaður fekk ábyrgd av sínum øki.

- Hvør eigur og hevur ábyrgd av teim ognum, ið aðalstýrini hava keypt/latið byggja, eftir at stýrisskipanin er broytt.

Svarið frá løgdeildini er lagt við sum fylgiskjal.

Í brævi til formannin í nevndini 23. juni 1999 ger løgmaður greitt, at landsstýrið á fundi 3. mai 1999 hevur gjørt av, at tað skal vera ein og sami stovnur, ið skal hava byggitekniskuábyrgdina og samsvarandi ræðisrætt yvir peningajáttanum.

Í brævi til formannin í nevndini 2. august 1999 svarar løgmaður uppá fyrispurning frá nevndini, at uppgávan hjá nevndini nú er: "At gera uppgávulýsing og starvsskipan serstakliga mótvegis einstøku stýrum og stovnum. Við hetta er at skilja, at tað sum eftir er hjá bólkinum at gera, er at lýsa markamótið millum, hvørjar arbeiðsuppgávur byggitekniski serkunnleikin, *-miðsavnaða eindin-*, skal røkja, og hvørjar arbeiðsuppgávur ein húsavørður, *-eindin á staðnum-*, skal røkja". Harumframt verður nevndin biðin um at lýsa fyrimunir og vansar við at leggja uppgávuna til ein stovn at røkja.

Við hesari greining av arbeiðssetninginum fór nevndin til verka fyrst í august 1999. Ymisk sjónarmið vóru tó enn í nevndini um, hvørt talan eigur at verða um at miðsavna byggitekniska serkunnleikan í eina felags almenna byggi- og bygningsumsiting, ella um hvørt stýrið sær kann hava egnu byggiteknisku eind, alt eftir tørvi hjá einstaka stýrinum. Umframt at tað heldur ikki bar til at fáa semju í nevndini um, hvørjar tekniskar og fíggjarliga heimildir ein miðsavnað byggi- og bygningsumsiting skal hava.

Greitt varð sostatt, at tað ikki fór at bera til at semjast um eitt felags tilmæli frá nevndini, og avrátt varð tí, at umboðini fyri Undirvísingar- og mentarmálastýrið og Almanna- og heilsumálastýrið skuldu gera sítt egna minnilutatilmælið. Freistin at handa løgmannið álitið varð samstundis longd til 1. november 1999.

Nevndarinnar vegna

Hákun Steingrímsson
formaður

Tórshavn, tann 15-06-99
J.Nr.: 300-19/99
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: IB

Tygara skriv

Løgdeildin
Løgmansskrivstovan
Postsmoga 64
110 Tórshavn

AVRIT

**Fyrispurningur um hvør eigur og hevur ábyrgd av landsins ognum.**

25.05-1999 varð ein nevnd sett at viðgera spurningin um, hvussu virksemið hjá núverandi landsarkitekti best kann skipast í framtíðini. Í hesum sambandi hava spurningar tikið seg upp, m.a. um ábyrgd og heimildir í sambandi við landsins ognir, sum nevndin fer at heita á Løgdeildina um at greina fyri seg.

Partur av arbeiðssetninginum hjá nevndini er:

- At gera uppgávulýsing og starvsskipan serstakliga mótvegis einstøku stýrum og stovnum
- At greina hvørja tekniska og fíggjarliga ábyrgd og heimildir byggifrøðiligi serkunnleikin skal hava á ymisku starvsøkjunum.

Á fyrsta fundi hjá nevndini varð greitt, at nakrir av høvuðsspurningunum at svara setninginum eru:

- **Hvør eigur og hevur ábyrgd av teim ognum, ið landið átti áðrenn stýrisskipanin varð broytt, og hvør landsstýrismaður fekk ábyrgd av sínum øki.**
- **Hvør eigur og hevur ábyrgd av teim ognum, ið aðalstýrini hava keypt/latið byggjað, eftir at stýrisskipanin er broytt.**

Hugsað verður her um grundleggjandi ognarrætt og ábyrgd av at varveita og dagføra virðið sambært nútíðar krøvum, herundir tryggja at bygningarnir eru í fullgóðum og nýtiligum standi. Hugsað verður ikki um vanligt brúkaraviðlíkahald, so sum minni broytingar og brúkaraspesifikkar funktiónir.

Nevndin hevur ógvuliga stutta tíðarfreist til arbeiðið sítt. Tilmælið skal latast Løgmansskrivstovuni 15. september 1999, og skal eg tí nevndarinnar vegna heita á Løgdeildina um at svara hesum fyrispurningi skjótast til ber. Eru spurningar ella ynskist ein nærri greining av fyrispurninginum, kunnu tit venda tykkum til undirritaðu ella Hákun Steingrímsson, formann í nevndini.

Vinarliga vegna nevndina

Ingibjørg Berg
skrivari

Tórshavn, tann 15-06-99
J.Nr.: 300-19/99
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: IB

Tygara skriv

Lønardeildin
Fíggjarmálastýrið
Postsmoga 2039
165 Argir

AVRIT

Soljóðandi fyrispurningur er í dag sendur løgdeildini:

**"Fyrispurningur um hvør eigur og hevur ábyrgd av landsins ognum.**

25.05-1999 varð ein nevnd sett at viðgera spurningin um, hvussu virksemið hjá núverandi landsarkitekti best kann skipast í framtíðini. Í hesum sambandi hava spurningar tikið seg upp, m.a. um ábyrgd og heimildir í sambandi við landsins ognir, sum nevndin fer at heita á Løgdeildina um at greina fyri seg.

Partur av arbeiðssetninginum hjá nevndini er:

- At gera uppgávulýsing og starvsskipan serstakliga mótvegis einstøku stýrum og stovnum
- At greina hvørja tekniska og fíggjarliga ábyrgd og heimildir byggifrøðiligi serkunnleikin skal hava á ymisku starvsøkjunum.

Á fyrsta fundi hjá nevndini varð greitt, at nakrir av høvuðsspurningunum at svara setninginum eru:

- **Hvør eigur og hevur ábyrgd av teim ognum, ið landið átti áðrenn stýrisskipanin varð broytt, og hvør landsstýrismaður fekk ábyrgd av sínum øki.**
- **Hvør eigur og hevur ábyrgd av teim ognum, ið aðalstýrini hava keypt/latið byggjað, eftir at stýrisskipanin er broytt.**

Hugsað verður her um grundleggjandi ognarrætt og ábyrgd av at varveita og dagføra virðið sambært nútíðar krøvum, herundir tryggja at bygningarnir eru í fullgóðum og nýtiligum standi. Hugsað verður ikki um vanligt brúkaraviðlíkahald, so sum minni broytingar og brúkaraspesifikkar funktiónir.

Nevndin hevur ógvuliga stutta tíðarfreist til arbeiðið sítt. Tilmælið skal latast Løgmansskrivstovuni 15. september 1999, og skal eg tí nevndarinnar vegna heita á Løgdeildina um at svara hesum fyrispurningi skjótast til ber. Eru spurningar ella ynskist ein nærri greining av fyrispurninginum, kunnu tit venda tykkum til undirritaðu ella Hákun Steingrímsson, formann í nevndini."

Nevndin vil fegin hava viðmerkingar frá Lønardeildini eisini, um okkurt er, sum Lønardeildin metir, at nevndin eigur at hava kunnleika um.

Vinarliga vegna nevndina

Ingibjørg Berg
skrivari

TINGANES • POSTSMOGA 64 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 10 10 • TELEFAX 35 10 15 • E-MAIL: LMS@FL.FO

Tórshavn, tann 23.08.1999
J.Nr.: 300-19/99 9
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: EL

Tygara skriv

Nýskipanardeildin
Løgmansskrivstovan
Postsmoga 64
110 Tórshavn

AVRIT

**Viðvíkjandi fyrispurningi um, hvør eigur og hevur ábyrgd av landsins ognum.**

Vísandi til skriv frá Nýskipanardeildini, dagfest tann 15. juni 1999, um hvør eigur og hevur ábyrgd av landsins ognum, skal Løgdeildin gera hesar viðmerkingar.

Spurningurin er í tveimum:
1. Hvør er eigari av landsins ognum, ið landið átti áðrenn stýrisskipanin bleiv broytt og hvør er eigari av ognunum, ið eru bygdar/keyptar aftaná broytingarnar í stýrisskipanini ?
2. Hvør hevur ábyrgd av ognumum, ið landið átti áðrenn stýrisskipanin bleiv broytt og hvør hevur ábyrgd av ognunum, ið eru bygdar/keyptar aftaná broytingarnar í stýrisskipanini ?

**1)**
Til at byrja við kann sigast, at ongar stýrisskipanarligar reglur eru um, hvør eigur landsins ognir.

Landsins ognir hava tó ein eigara, og er hann – sum orðið sigur – landið. Hvør ella hvat landið er, er harafturímóti ikki heilt einfalt at svara uppá. Sjálvt um landið sum juridiskur persónur setur eitt ella annað í verk, keypir ella selur okkurt, ber ikki rættiliga til í hesum sambandi at skilja landið sundur í smærri eindir sum t.d. stýri ella stovnar.[1]

Um skiljast skal ímillum, hvør var eigari áðrenn og aftaná broytingarnar í stýrisskipanini sæst ikki vera av týdningi í hesum sambandi, tá talan er um ein og sama eigara.

**2)**
Um ábyrgdina av landsins ognum eru heldur ongar beinleiðis reglur. Tó er ábyrgdarspurningurin tætt knýttur at reglunum um hvør, ið kann ráða yvir ognunum og kann vegleiðing sostatt fáast haðani.

Í gomlu stýrisskipanarlógini, § 19, 2. pkt., 2. lið, varð staðiliga ásett, at fastognir landsins (í danska tekstinum stendur ".... nogen Lagtinget tilhørende ejendom") ikki máttu seljast ella latast av hondunum uttan sambært løgtingslóg.

Eftir galdandi stýrisskipan, sum tó ikki endurtekur hesa áseting, liggur ræðið á fíggjarviðurskiftunum eisini hjá løgtinginum, og løgtingið hevur somuleiðis eftirlit við fíggjarviðurskiftunum. Løgtingið er tann játtandi myndugleikin, og landsstýrið kann bara ráða

[1] "...hvad staten betyder som navn for det subjekt hvortil handlinger henregnes... ...har i virkeligheden ingen mening": Alf Ross: " Dansk statsforfatningsret 1, s. 35, Kbh. 1983.

TINGANES • POSTSMOGA 64 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 10 10 • TELEFAX 35 10 15 • E-MAIL: LMS@FL.FO

yvir landskassanum eftir heimild frá løgtinginum. Allar inntøkur og útreiðslur landsins, orsakað av keypi ella sølu o.ø. skulu soleiðis hava serliga heimild.[2]

Landsinds fíggjarligu viðurskifti – heruppií umsitingin av landsins ognum – viðvíkja øll á henda hátt landskassanum, ið landsstýrið bert við heimild frá løgtinginum kann ráa yvir.

Sambært § 9 í gomlu stýrisskipanarlógini, hevði hvør landsstýrismaður ábyrgd yvir fyri løgtinginum av at røkja tað umboðsvald og ta umsitan, sum teimum er latin upp í hendur, beint og forsvarliga. § 12 í gomlu lógini ásetti eisini, at tað var skylda landsstýrissins at ansa eftir, at ongar útreiðslur vórðu goldnar, sum ikki høvdu heimild í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg. Her skal tað ógreiða ábyrgdarbýtið, ið fylgdi av kollegiala stýrisháttinum havast í huga, soleiðis at ikki ber altíð til at siga, hvør hevði ábyrgdina av ymiskum avgerðum.

Aftaná at nýggja stýrisskipanarlógin er sett í gildi, eru sum kunnugt stórar broytingar farnar fram. Her er serliga av týdningi, at uppgávur landsstýrisins eru býttar út á tey ymisku stýrini, har hvør landsstýrismaður hevur ábyrgdina av egnum málsøkjum.

Løgmaður hevur sambært § 33 í stýrisskipanarlóginmi eftirlit við at landsstýrismenninir fyrisita síni málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Samanbera vit hetta eftirlit við tað eftirlit, ið danski forsætisráðharrin verður hildin at hava við sínum ráðharrum, so er talan um eina skyldu til eftirlit í serligum førum, tá ið ávís viðurskifti í embætisrakstrinum hjá einum ráðharra greitt benda á, at okurt óregluligt gongur fyri seg.[3] Annars eru ráðharrarnir líkastillaðir og hava ábyrgd hvør av sínum umráði. Á líknandi hátt ásetir stýrisskipanarlógin, at landsstýrismenninir sita fyri málsøkjum sínum hvør sær.

Tey einstøku stýrini hava keypt og selt ognir og eisini hava tey sínar egnu rakstrarjáttanir á løgtingsfíggjarlógini. Heimildin til at ráða yvir ognunum, so sum leiga, keyp og søla o.a., fylgir - umframt at løgmaður hevur lagt málsøki til viðkomandi landsstýrismann - tó framvegis av játtanini frá løgtinginum. Stýrini eru sostatt ikki eigarar sum so, men hava einans rætt til at ráða yvir teimum ognum, ið hoyra stýrinum til.

Ábyrgdin av teim einkultu ognunum er eftir hesum tætt tengd at rættinum til at ráða, sum aftur framgongur av játtanareglunum.

Viðmerkjast skal, at her er ikki tikin støða til ognar- og ábyrgdarviðurskiftini hjá grunnum og almennum partafeløgum v.m..

**Niðurstøða**

Ognarviðurskifini viðvíkjandi landsins ognum mugu haldast at vera óbroytt, eisini aftaná broytingarnar í stýrisskipanarviðurskiftunum, soleiðis at landið sum so framvegis er eigari av ognunum.

Ábyrgdin av landsins ognum, áðrenn stýrisskipanin bleiv broytt, má vera hildin at hava ligið hjá landsstýrinum sum heild, um tað ikki var møguligt at staðfesta ábyrgdina hjá einkultum landsstyrismanni.

---

[2] Henda heimild kann vera ein inntøkujáttan ella ein útreiðslujáttan, veitt við fíggjarlóg, eykafíggjarlóg ella eykajáttan frá fíggjarnevndini. Tó krevst ikki serlig heimild til sølu av t.d. útbúnaði, tá hetta verður roknað sum ein náttúrligur partur av rakstrinum og liggur innanfyri tað almennu rakstrarheimildina fyri viðkomandi stovn.

[3] Jens Peter Christensen: Ministeransvar, 1997 sí t.d. s. 98.

Av tí at tað aftaná broytingarnar í stýrisskipanarviðurskiftunum framvegis ikki eru nakrar formligar ásetingar eru um, hvør skal hava yvirábyrgdina av ognunum, verður tað upp til hvørt stýri sær, sum brúkari og fyrisitandi myndugleiki, at ansa eftir ognunum. Ábyrgdin av at varðveita og dagføra landsins virði liggur soleiðis í seinasta enda hjá hvørjum landsstýrismanni sær, sum gjøgnum játtanina til viðkomandi stýri hevur fingið heimild frá løgtinginum til at ráða yvir ognunum.

Í serligum føri kann tó hugsast, at ábyrgdin av ognunum verður hjá løgmanni, sum sambært stýrisskipanarlógini skal hava eftirlit við fyrisitingini hjá landsstýrismonnunum.

Vinarliga

Rúni Joensen
deildarstjóri

# Uppskot til skipan av byggi- og bygningsumsiting
# Meirilutatilmæli

Tórshavn 1. november 1999

## Innihaldsyvirlit

Endamálið við eini byggi- og bygningsumsiting........3

Høvuðsuppgávur........3
Ný- og umbygging........4
Viðlíkahald........5
Leigumál........6
Aðrar tvørgangandi uppgávur........6

Skipan........6
Uppskot til nýggja skipan........7

Fyrimunir og vansar við eini miðsavnaðari byggi- og bygningsumsiting........8
Fyrimunir........8
Vansar........9
Skipanir í øðrum londum........9

### Fylgiskjøl

Fyrispurningur til løgdeildina og svar
Upprit frá Ole Jensen, landsarkitekti, sum víst er til í fótnotu 2
Minnilutatilmæli frá umboðunum í Almanna- og heilsumálastýrinum og Undirvísingar- og mentamálastýrinum

## 1. Endamálið við eini byggi- og bygningsumsiting

Endamálið við eini miðsavnaðari byggi- og bygningsumsiting er at skapa bestu og munadyggastu karmarnar um byggiuppgávur hjá tí almenna, herundir eisini at optimera nýtsluna av íløgum í mun til rakstrartilfeingi, at tryggja eitt byggifrøðiliga fullgott og munadygt viðlíkahald av øllum landsins ognum- við fíggjarligum, umsitingarligum og tekniskum atliti, soleiðis at umhugsni fyri mentan, byggilist, umhvørvi og nýtslumøguleikum verður røkt og varðveitt, og at útvega landsins stovnum o.ø. egnaði høli at virka í.

Áhugamálini hjá eini byggi- og bygningsumsiting, og tí aðalstýri, sum hevur bygningin fyri neyðini, eru tey somu: At fáa sum mest burtur úr tí, sum gjørt verður. Endamálið er tí ikki at fáa eina einsíðuga "eftirlitsfunktión", men heldur ein vitanardepil og eina verkætlanarstýring, ið megnar at taka sær av byggiverkætlanum saman við avvarandi pørtum.

Til landsins ognir hoyra umframt bygningar eisini minnisvarðar, standmyndir, tún, urtagarðar, træðir v.m.

## 2. Høvuðsuppgávur

Høvuðsuppgávurnar kunnu sundurgreinast í hesar bólkar:

❖ **Ný- og umbygging**
- Ráðgeva aðalstýrum og stovnum í at tilrættarleggja ný- og umbyggingar
- Seta í gongd og samskipa ný- og umbygging sambært løguætlanini hjá einstøku stýrunum
- Játtanarstýring í sambandi við byggiverkætlanir
- Samskipa byggivirksemið sum heild við atliti til samfelagsbúskapin

❖ **Viðlíkahald**
- Viðlíkahaldseftirlit
- Raðfesta tørv í mun til játtan í samráð við brúkaran
- Seta í gongd og samskipa tann partin av viðlíkahaldsarbeiðinum, ið ikki liggur hjá einstaka stovninum at røkja.
- Játtanarstýring í sambandi við viðlíkahaldsarbeiði
- Viðlíkahald, eftirlit og góðkenning av friðaðum ognum

❖ **Leigumál**
- Góðkenna leigusáttmálar

❖ **Aðrar tvørgangandi uppgávur**
- Tørvsmeting og disponering av bygningum hjá tí almenna fyri at fullnýta nýtsluvirðið

- Gera reglugerðir og leiðbeiningar av almennum og ítøkiligum slagi
- Skráseting av landsins ognum og leigumálum
- Felags bygningstryggingar

**Ný- og umbygging:**

Allar játtanir til ný- og umbygging av hølum verða savnaðar undir einari grein á fíggjarlógini, sum ein og sami landsstýrismaður hevur ræðisrættin yvir.

Ný- og umbyggingar verða ráðlagdar í sambandi við, at løgujáttanin á fíggjarlógini verður gjørd. Í sambandi við raðfesting av játtanini verður fyrst tikið hædd fyri tí virksemi, ið longu er í gongd. Mett eigur eisini at verða um samfelagsbúskaparlig árin av ætlaða byggivirkseminum, og um ráðiligt kanska er at bíða eina tíð. Játtanin verður sundurskilað í endamál.

Einstaka stýrið metir sjálvt um hølistørv, og um hvørt talan skal vera um nýbygging, keyp ella leigu. Men hetta skal verða gjørt í samráð við byggi- og bygningsumsitingina – tvs. at stýrini hava ráðføringarskyldu. Byggi- og bygningsumsitingin metir fyrst saman við stýrinum, um egnaði høli longu eru til taks millum almennu ognirnar. Í sambandi við nýbygging og umbyggingar skulu atlit frá byrjan verða til vøkstur í dagliga rakstrarkostnaðinum, viðlíkahaldkostnaði og nýtslumøguleikum.

Greiðar mannagongdir verða gjørdar fyri samskipan við brúkaran í tilrættarleggingarfasun, at tryggja, at servitanin á einstøku økjunum fær avgerandi ávirkan á kravsetanina. Byggi- og bygningsumsitingineigur verður skipað soleiðis, at hon í nøktandi mun hevur fyrilit fyri hesum.

Byggi- og bygningsumsitingin tekur allar byggifrøðiligar avgerðir í sambandi við byggiverkætlanir og hevur fíggjarliga ábyrgd av samlaðu verkætlanini (tvs. er byggiharri). Brúkarin (viðkomandi aðalstýri) tekur lut sum partur av bygginevndini, so tryggjað verður, at krøvini, ið sett eru til bygningin, verða fylgd á nøktandi hátt. Tá ein bygningur er liðugur, verður hann handaður brúkaranum, og ábyrgdarbýtið verður sum umrøtt undir "viðlíkahald".

Endamálið er m.a. at byggja upp eina tekniska umsiting við fakligum førleika á høgum støði, sum kann verða eitt munadygt avgerðargrundarlag undir øllum almennum byggivirksemi – herundir bæði meta um vágar og hava innlit í tørv hjá brúkaranum og seta hann í mun til játtanarligar møguleikar. Endamálið er eisini at fáa skapt eina verkætlanarstýring, ið megnar at taka sær av byggiverkætlanum saman við avvarandi pørtum.

**Viðlíkahald**

Ein játtan til umsiting av øllum ognum landsins og viðlíkahald av bygningunum verður eins og løgujáttanin miðsavnað undir einum landsstýrismanni. Men hvørt aðalstýrið hevur umframt eisini sína egnu játtan til viðlíkahald sambært niðanfyri lýsta ábyrgdarbýti.

Ábyrgdarbýtið í sambandi við viðlíkahald

Dagligu ábyrgdina av landsins ognum hevur leiðarin á staðnum. T.v.s. at um eithvørt brek verður staðfest, er tað ábyrgdin hjá stovnsleiðaranum antin at umvæla ella fráboða brekið hjá byggi- og bygningsumsitingini – hetta í mun til um brekið hoyrir til uppgávuøkið hjá stovnsleiðaranum ella byggi- og bygningsumsitingini (meira um hetta býtið niðanfyri). Hoyrir brekið til uppgávuøkið hjá byggi- og bygningsumsitingini, fellir ábyrgdin hjá stovnsleiðaranum burtur, í teirru løtu brekið er fráboðað.

Leiðarin á byggi- og bygningsumsitingini hevur ábyrgd av brekum, ið eru fráboðaði umframt brekum, ið verða staðfest við regluligum bygningssýnum.

Nærri tilskilað hevur byggi- og bygningsumsitingin ábyrgd av øllum uppgávum av tílíkum slagi, ið krevja byggifrøðiligan serkunnleika. Uttan at gera ein úttømandi lista kunnu hesar t.d. vera:

- viðlíkahald av bygningskonstruktiónum
- størri innandura og uttandura umvælingar
- sáttmálar um størri tænastuveitingar
- játtanarstýring
- regluligt bygningssýn og uppfylging

Leiðslan á staðnum hevur ábyrgd av uppgávum av tílíkum slagi, ið ikki krevja byggifrøðiligan serkunnleika. Hesar kunnu t.d. vera:

- sáttmálar um smærri tænastuveitingar
- leigurættarligar skyldur so sum innandura máling, tapetsering, ísetan av leysum flisum v.m.
- Innandura viðlíkahald so sum hiti, ventilatión, smærri el-umvælingar, smærri ábøtur, reingerð, orkunýtsla, eldávaringar v.m.
- dagligt, uttandura viðlíkahald so sum rudda tún, kavarudding, smærri ábøtur v.m.
- generelt húsavørðaarbeiðið annars
- reglulig bygningssýn saman við byggi- og bygningsumsitingini
- viðlíkahald av tøkniligum innleggingum og edv-innleggingum, saman við byggi- og bygningsumsitingini eftir nærri ásettari mannagongd

Byggi- og bygningsumsitingin staðfestir í sambandi við reglulig bygningssýn, saman við brúkarunum, viðlíkahaldstørvin fyri allar bygningar hjá landinum, og tey gera í felag uppskot til langtíðar viðlíkahaldsjáttan (5-10 ár). Byggi- og bygningsumsitingin raðfestir viðlíkahaldstørvin av øllum landsins ognum eftir ávísari flokkingarskipan og setir viðlíkahaldsarbeiðini í verk og stýrir teimum í samráð við viðkomandi stýri/stovn.

Leiðarin á byggi- og bygningsumsitingini kann í avtalu við einstaka stovnsleiðaran leggja partar av viðlíkahaldsábyrgdini, ið sum útgangsstøði liggur hjá byggi- og bygningsumsitingini, til stovnsleiðaran, t.d. um hesin hevur ein húsavørð, ið hevur serligt hegni til ávísar uppgávur.

**Leigumál**

Áðrenn eitt stýri ella stovnur gera leigusáttmála við privatan útleigara, skulu tey kanna hjá byggi- og bygningsumsitingini, um egnaði høli longu eru til taks.

Byggi- og bygningsumsitingin skal góðkenna allar leigusáttmálar hjá almennum stýrum og stovnum til tess at tryggja at prísir, góðska, skyldur í sambandi við viðlíkahald og aðrar treytir fylgja vanliga støðinum í almennum leigusáttmálum.

**Aðrar tvørgangandi uppgávur**

Byggi- og bygningsumsitingin skrásetir allar ognir landsins og leigumál til tess at fáa fullfíggjað yvirlit yvir hølistilfeingið hjá tí almenna og til tess, at eingir bygningar detta burturímillum, tí eingin dagliga varar av teimum.

## 3. Skipan

Størsti parturin av almennu umsitingini húsast í bygningum, ið landið eigur. Áðrenn bygnaðarbroytingarnar var "eigarin" Føroya Landsstýri v./fíggjar- og búskapardeildini, og virkaði Landsarkitekturin sum bygningsumsiting. Nú eru einstøku aðalstýrini farin undir at "ogna sær" bygningar og standa sjálvi sum "eigarar". Landsarkitekturin er ikki longur beinleiðis knýttur at "eigaranum", og aðalstýrini hava nú sjálvi starvsfólk – ikki altíð við byggitekniskum førleika – sum hava ábyrgd av at viðlíkahalda bygningarnar, og onkur stýri eru á hendan hátt við at stovna egnu bygningsumsiting.

Ymiskt er, hvussu nógvum bygningum stýrini hava ábyrgd av, men grundarlag er ikki fyri, at hvørt stýrið sær, á munadyggan hátt, kann reka egnu bygningsumsiting á fullgóðum fakligum støði. Harafturat kemur, at um byggitekniski førleikin ikki er savnaður á einum staði, verður torført at fáa eitt samlað yvirlit og harvið fullgóða nýtslu av landsins ognum og yvirskipaða stýring av viðlíkahaldinum.

Í svari 23. august 1999, uppá fyrispurning frá nevndini, sigur løgdeildin á Løgmansskrivstovuni m.a. at: "Heimildin at ráða yvir ognum, so sum leiga, keyp og søla o.a., fylgir– umframt at løgmaður hevur lagt málsøki til viðkomandi landsstýrismann – tó framvegis av játtanini frá løgtinginum. Stýrini eru sostatt ikki eigarar sum so, men hava einans rætt til at ráða yvir teimum ognum, ið hoyra stýrunum til".

Í niðurstøðuni verður m.a. sagt at: "Av tí at tað aftaná broytingarnar í stýrisskipanarviðurskiftunum framvegis ikki eru nakrar formligar ásetingar um, hvør skal hava yvirábyrgdina av ognunum, verður tað upp til hvørt stýri sær, sum brúkari og fyrisitandi myndugleiki, at ansa eftir ognunum. Ábyrgdin av at varðveita og dagføra landsins virði liggur soleiðis í seinasta enda hjá hvørjum landsstýrismanni sær, sum gjøgnum játtanina til viðkomandi stýri hevur fingið heimild frá løgtinginum at ráða yvir ognunum.

Í serligum føri kann tó hugsast, at ábyrgdin av ognunum verður hjá løgmanni, sum sambært stýrisskipanarlógini skal hava eftirlit við fyrisitingini hjá landsstýrismonnunum."

Av svarinum frá løgdeildini framgongur sostatt, at tað er tann landsstýrismaðurin, sum frá løgmanni hevur fingið málsøkið at ráða yvir, sum hevur ábyrgd av teim ognum, ið játtanarliga hoyra til økið, og við játtanini heimild frá løgtinginum at ráða yvir ognunum. Løgmaður kann sostatt altíð avgera at leggja ábyrgdina av byggitekn isku uppgávunum í sambandi við landsins ognum til serstakan stovn undir *einum og sama* landsstýrismanni at umsita.

**Uppskot til nýggja skipan**

At røkka endamálinum hjá eini almennari byggi- og bygningsumsiting, sum greitt er frá omanfyri, er neyðugt við einum miðsavnaðum, tekniskum stovni. Neyðugt er við ávísari støðd fyri at røkka einum fakligum umhvørvi á fullgóðum støði, eins og neyðugt er at savna byggitekniska førleikan á *einum* staði fyri at fáa eitt samlað yvirlit og harvið fullgóða nýtslu av landsins ognum og yvirskipaða stýring av bygging og viðlíkahaldi.

Landsverkfrøðingastovnurin, sum í ávísan mun røkti hesar uppgávur, áðrenn landsarkitektur varð settur, røkir í dag uppgávur, ið fevna um bygningar og aðra bygging - líka frá projektering til liðugt verk.

> **Mælt verður tí til at skipa allar byggitekniskar uppgávur í eina felags byggi- og bygningsumsiting á landsverkfrøðingastovninum, ið hevur byggitekn isku ábyrgdina av øllum landsins ognum og samsvarandi ræðisrætt yvir peningajáttanum, hetta so at ábyrgdin fyri uppgávuni og játtanarlig heimild eru á sama stað.**[1]

---

[1] Ole Jensen hevur í fylgiskjali 1 gjørt sínar serstaku viðmerkingar til plasering av byggi- og bygningsumsitingini. Fylgiskjalið umfatar bert sjálva plaseringina og ikki uppgávur og uppgávubýtið, ið annars er mælt til.

Uppgávubýtið mótvegis stýrunum eigur at verða sum omanfyri lýst.

## 4. Starvsfólkatørvur og kostnaður

Roknað verður við, at eini 3 fólk burturav skulu taka sær av miðsavnaðu uppgávunum, og at uppgávurnar annars verða gjørdar á privatum hondum[2]. Afturat hesum verður eitt sindur meira av trýsti á rokniskapardeildini á landsverkfrøðingastovninum. Verandi studningsskipan til vegir og havnir, ið landsverkfrøðingastovnurin nýtir í dag, kann verða nýtt sum fyrimynd, men skal dagførast til endamálið. Eftirlitsskipan skal byggjast upp og skjalatilfar fáast til vega og skrásetast.

Samanumtikið metir nevndin ikki, at ein miðfirring av byggi- og bygningsumsitingini nýtist at hava eykakostna við sær, tí talan verður í stóran mun um at flyta tilfeingi við uppgávum heldur enn at byggja upp av nýggjum. Í mun til at talan kann verða um fleiri miðspjaddar eindir, metir nevndin tvørturímóti at talan er um stóra sparing við at miðsavna økið.[3]

## 5. Fyrimunir og vansar við eini miðsavnaðari byggi- og bygningsumsiting

### Fyrimunir

Eitt samlað yvirlit yvir høli og hølistørv hjá øllum almennum stovnum og stýrum gevur smidligheit og betri gagnnýting av hølishøpinum, eins og yvirskipaða stýring og raðfesting av viðlíkahaldinum.

At allar byggiuppgávur verða savnaðar í ein stovn, ið frammanundan hevur byggitekniskan førleika og royndir, skuldi givið besta grundarlag undir munadyggari bygningsumsiting og verkætlanarstýring á fullgóðum fakligum støði - bæði við atliti til tørv hjá brúkaranum í mun til játtanarligar møguleikar, og við atliti til samfelagsbúskapin í síni heild, m.a. tí møguleikin fyri langtíðar ráðlegging gerst betur, og stýrini fara ikki hvørt í sínum lagi og yvirbjóða hvørt annað um somu hondverkarar.

---

[2] Í dag er talið av starvsfólkum, ið fáast við økið 3 ½

[3] Hóast hetta liggur uttanfyri setningin hjá nevndini, metir meirilutin í nevndini, at ein skipan, har almennir stovnar og stýrið, ið húsast í ognum hjá landinum, gjalda húsaleiðu, eigur at verða kannað nærri og møguliga sett í verk eftir ávíst tíðarskeið, bæði tí at tað fer at geva eina rættvísari mynd av útreiðslunum, eins og tað sampakkar við rákið við fíggjarligari miðfirring og delegatión av fíggjarligum heimildum og ábyrgd. At leiguútreiðslur verða partur av rakstrinum fer at føra við sær meira optimala fermetranýtslu og umhugsni, tá bygt verður av nýggjum.

At byggifrøðiligu heimildirnar og játtanarligu heimildirnar liggja á einum staði skuldi givið skjótari og smidligari málsgongd í sambandi við gerð av avtalum, ávísingum v.m. Umframt at tað eisini skuldi givið neyvari eftirlit við peninganýtsluni.

At ábyrgdin fyri ný- og umbygging og fyri viðlíkahaldi liggja á sama staði, fer at bera við sær størri áeggjan at viðlíkahalda. Útreiðslurnar til viðlíkahald fara, sum er, av rakstrinum hjá viðkomandi stovni. Undir verandi skipan skulu stovnsleiðslur sostatt áhaldandi velja millum at nýta tøka tilfeingið til at bøta um kjarnuveitingarnar (ta tænastu sum stovnurin er til fyri at veita), ella at taka tilfeingi frá kjarnuveitingunum til at halda bygningar (hetta ber til, tí at langt frá alt viðlíkahald er í dag játtað á høvuðskonto). Sleppa bygningar hinvegin at farast, verður ný- og umbygging gjørd yvir løgujáttanina og ikki rakstrarjáttanina hjá einstaka stovninum – tí er væntandi, at stórur munur verður á hvussu raðfest verður millum stuttskygdan og langtskygdan tørv, alt eftir hvar ábyrgdin liggur.

Ein skipan, ið eggjar til ov lítið viðlíkahald, er í longdini samfelagsliga dýr. Vit eiga at stevna ímóti eini skipan, sum tryggjar at bygningarnir hjá hinum almenna verða riknir nøktandi og forsvarliga, soleiðis at sleppast kann undan at gera íløgur í kostnaðarmiklar ábøtur á bygningar, sum eru farnir ov skjótt vegna væntandi hald.

**Vansar**

Ein vansi fyri aðalstýrini er, at løgu og bygningsrakstrarligar heimildir verða skildar frá yvirskipaðu heimildunum stýrini annars hava. Tað kann m.a. føra við sær, at ein partur av dynamikkinum í skipanini hvørvur. Tí er avgerandi neyðugt, at greið mannagongd verður gjørd, sum tryggjar aðalstýrunum ávirkan í sambandi við tilrættarlegging og kravseting til við ný- og umbygging.

Meira spesialiserað krøvini til høli, innleggingar og útbúnað eru (t.d. skúla- og granskingarøki og verjuøki, sum í Danmark hava egnu byggieind, sí part um skipanir í øðrum londum), verri er miðsavnað at meta um tørv á nýmótansgerð og viðlíkahaldi. Tað er tí av týdningi at greiðar mannagongdir eru, sum tryggja at servitanin á einstøku økjunum verður nýtt í tilrættarleggingarfasuni, og at miðsavnaða eindin er skipað soleiðis, at hon í nøktandi mun hevur fyrilit fyri hesum, eins og at brúkarin er limur í bygginevndum o.t. at tryggja at krøvini verða fylgd á nøktandi hátt.

## 6. Skipanir í øðrum londum

Í hinum norðurlondunum er byggiteknisk fyrisiting í høvuðsheitum miðsavnað. Í Svøríki er miðsavningin heilt gjøgnumførd, og almennu ognirnar eru har lagdar til privat feløg at reka eftir fríum marknaðarligum fyritreytum.

Í Norra, Danmark og Finnlandi eru skipanirnar eitt sindur ymiskar í mun til málsøki. Har krøvini til høli og útbúnað í stóran mun eru spesialiserað, er økið skipað undir viðkomandi ráðharrastovu. Soleiðis hava Forskningsministeriið og Verjuministeriið í Danmark, sum bæði bygnings og anlegsliga eru stór í vavi og spesialiseraði, t.d. hvør sítt byggitekniskt stýri, meðan restin er savnað hjá By-og boligministeriet. – Her er vert at viðmerkja, at í Føroyum høvdu tær spesialiseraðu eindirnar verið so smáar, at ivasamt er, um tað hevði borið teimum til at uppbygt og varðveitt dagførda servitan á økjunum, meðan tær í Danmark altíð vilja vera væl størri enn ein felags, miðsavnað umsiting í Føroyum..

Í Danmark og Norra eru ætlanir um í størri mun at miðsavna økið, m.a. í sambandi við at mælt verður til at innføra eina húsaleigugjaldskipan. Hetta hóast talan frammanundan er um stórar eindir. Í Danmark hevur ein arbeiðsbólkur júst gjørt eitt tilmæli, ið m.a. mælir til at leggja byggiteknisku eindina í Forskningsministeriinum undir By- og boligministeriet. Endamálið er at fáa eina hákvalifiseraða byggiteknisk umsiting, sum skal rekast eftir vanligum marknaðartreytum eins og í Svøríki – kortini eru ætlanir ikki um at privatisera økið, soleiðis sum svenskarar hava gjørt.

Hákun Steingrímsson
formaður

Ingibjørg Berg
skrivari

Finnleif Durhuus

Petur Alberg Lamhauge

Ole Jensen

# Uppskot til skipan av byggi- og bygningsumsiting
# Minnilutatilmæli

Tórshavn 1. november 1999

## Inngangur

Ein partur av arbeiðssetninginum er at finna hóskandi stað at skipa virksemið hjá núverandi landsarkitekti og byggifrøðiliga serkunnleikanum í síni heild, við atliti at best møguligari gagnnýtslu av tilfeingi og serkunnleika innan økið. Fyrstu fundirnir hjá nevndini vóru merktir av, at ymisk sjónarmið vóru um, hvørt talan átti at vera um at mæla til at miðsavnað byggitekniska kunnleikan í *ein* stovn, ella um hvørt stýri sær kann hava egna tekniska deild, alt eftir tørvinum hjá tí einstaka stýrinum.

Viðgerðin av tí partinum av arbeiðssetninginum, sum er at greina hvørja tekniska og fíggjarliga ábyrgd og heimildir byggifrøðiligi serkunnleikin skal hava, á ymsu starvsøkjunum, førdi somuleiðis til sera ymisk sjónarmið í nevndini. Ósemja var um, hvør eigur at hava ráðgevandi funktiónina, t.e. um landsarkitekturin hevur ein ráðgevandi leiklut mótvegis teim ymsu stýrinum, ella um landsarkitekturin nýtir stýrini sum ráðgevarar. Hesin spurningur hongur neyvt saman við hvussu ábyrgd, heimildir og játtanir verða býttar millum landsstýrismennirnir fyri tey ávísu økini, og hvørjar heimildir ein møguligur miðsavnaður stovnur skal hava framyvir.

Greitt var, at tað ikki var møguligt at semjast um eitt felags uppskot frá nevndini, og avrátt varð tí, at umboðini fyri Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Almanna- og heilsumálastýrið gera sítt egna uppskot til skipan av tí byggifrøðiliga serkunnleikanum innan almennu umsitingina.

## Skipan í dag

### *Almanna- og heilsumálastýrið*

Síðst í 1997 segði landsarkitekturin seg frá, at hava viðlíkahald um hendi fyri almanna- og heilsumál. Umsitingin í Almanna- og heilsumálastýrinum sat frá einum degi til annan, við øllum um hendi, uttan nágreiniliga at vita, hvat var sett í gongd, hvussu nógv var brúkt, og hvat var disponerað yvir. Sjálvt um landsarkitekturin til síðst í 1997 tok sær av viðlíkahaldi og byggimálum innan almanna- og heilsuøkið, vóru játtanir settar av á fíggjarlógini innan almanna- og heilsuøkið. Í dag verður landsarkitekturin nýttur sum ráðgevi í einstøkum byggimálum.

Almanna- og heilsumálastýrið umsitur eitt tal av fastari ogn. Talan er um eitt tekniskt sera kompliserað økið við tungum installatiónum og háteknologiskum tólum. Flestu stovnarnir hava starvsfólk til at taka sær av dagliga rakstrinum og viðlíkahaldinum av hesum. Umleið 100 starvsfólk tilsamans eru sett innan hetta virkisøki. Tað eru tó stovnar, ið eru ov smáir til at hava starvsfólk burturav til at røkja tílíkar serstakar uppgávur.

Stýrið er farin undir at raðfesta umfatandi renoveringsarbeiðir, sum verða neyðug at fáa gjørd komandi árini saman við nýíløgum til røktarheim, serstovnar og sjúkrahús. Til tað krevst fakligur førleiki og ein daglig umsiting av øllum tí samlaða virkisøkinum. Tað er neyðugt at hendan funktiónin samstundis hevur eitt neyvt innlit í dagliga rakstrinum. Almanna- og heilsumálastýrið hevur tí sett ein byggitekniskan stjóra frá 1. desember

1999. Í mun til ta miðsavnaðu eindina er her talan um eina dagliga umsiting, stýring og eftirlit av øllum økinum og eina funktión, sum kann viðvirka til at stuðla uppundir eina miðsavnaða eind, sum tekur sær at tí meiri yvirskipaðu funktiónini.

*Undirvísingar- og mentamálastýrið*

Kommunurnar fingu inntil miðskeiðis í nítiárunum tilsamans 50 % í studningi úr lands- og ríkiskassa til ný- og umbygging av fólkaskúlunum, meðan tær ongan studning fingu til viðlíkahald. Tað var tí neyðugt, tá ið kommurnar søktu um studning til umbyggingararbeiði, at játtandi myndugleikin kannaði eftir, um talan var um umbyggingar- ella viðlíkahaldsarbeiði. Landsverkfrøðingurin var í mong ár landsmyndugleikunum til hjálpar við hesum kanningararbeiði.

Tá ið tað ráddi um nýbygging var mannagongdin ein onnur. Nýbyggingin var kannað av Landsskúlafyrisitingini og danska myndugleikanum Byggedirektoratet og góðkend av Landsskúlaráðnum við tilmæli til landsstýrið um at játta byggistudning við støði í teirri kostnaðarætlan, sum var til taks. Tá ið bygningurin var liðugur, og grannskoðaður roknskapur latin inn, var endaligur studningur veittur og útgoldin við støði í roknskapinum. Í summum førum var á konto gjald latið kommunum við støði í upprunaligu studningsjáttanini. Tá ið bygningurin var liðugur, kostaði hann vanliga meira enn ætlað var, og kommunan søkti um meira studning í mun til roknskapartølini. Í mong ár var hetta vanlig mannagongd, tá ið studningurin var latin til skúlabyggingar, men síðan vóru roknskaparfólk biðin um at rokna veruliga kostnaðarhækkingina í byggitíðini, og meirstudningur var einans játtaður við støði í gjørdum útrokningum. Kommunurnar vóru ónøgdar við hesa nýggju mannagongd, av tí at nú fingu tær ikki byggistudning í mun til roknskapartølini, men eitt krónutal sum serfrøðingar útroknaðu.

Fyri at byrgja upp fyri teirri ónøgdini, var landsarkitekturin settur, sum kundi verða landsmyndugleikanum til hjálpar við skúlabyggimálum og hava tamarhald á byggiútreiðslunum. Landsarkitekturin var bót á borðið, bæði tá ið talan var um byggitekniskar uppgávur, og tá ið tað ráddi um ætlaðar byggiútreiðslur. Ætlaðar byggiútreiðslur samsvaraðu nú við endaliga byggiroknskapin. Landsskúlafyrisitingin og Landsskúlaráðið løgdu seg ikki út í, hvar landsarkitekturin hevði sín starvsstað. Tað var landsstýrið, sum gjørdi av, hvar landsarkitekturin hevði síni høli.

Undirvísingar- og mentamálastýrið nýtir í dag landsarkitektin sum byggifrøðiligan ráðgeva í sambandi við viðlíkahald, ný- og umbyggingar, nýggj leigumál og fíggjarlógararbeiði. Hetta arbeiði snýr seg í høvuðsheitum um:

- Eftirlit við og játtanarstýring av byggiarbeiðum fyri stýrið
- Tilknýti at bygginevndum, sum verða settar í sambandi við størri ný- og umbyggingar
- Tilmæli til landsstýrismannin í sambandi við áseting av løgukarmi og viðlíkahaldskarmi
- Ummæli av umsóknum um studning til ítróttaanlegg, ítróttarhús, ungdóms/bygdahús og sjónleikarahús. Sýning og góðkenning av somu anleggum.

- Ráðgeva Fólkaskúladeildini í sambandi við góðkenning av ný- og umbyggingum av fólkaskúlum og samstarva um byggitekniskar spurningar

## Skipan framyvir

Í sambandi við bygging og viðlíkahald er tað av sera stórum týdningi, at tann byggitekniski serkunnleikin og tann serkunnleiki, sum liggur í stýrinum, verða samskipaðir. Í sambandi við t.d. skúlabygging, har tann námsfrøðiliga hugsanin hevur stóra ávirkan á arbeiðið, eiga námsfrøðiligu krøvini at síggjast aftur í bygningunum og harvið eisini verða tað grundarlagið, sum nýbygging og viðlíkahald verða framd útfrá. Tað sama er galdandi innan sjúkrahúsøki, har tað er alneyðugt, at tann dagligi raksturin verður útgangsstøði, tá ið raðfestast skal, hvussu tær avmarkaðu resursirnar skulu brúkast.

Fyri at tryggja at serligi kunnleikin í stýrinum kann hava ta neyðugu ávirkanina í byggitekniskum málum, verður mælt til, at verandi skipan við landsarkitektin sum ráðgeva hjá stýrinum í byggitekniskum spurningum heldur fram. Hetta merkir, at tann ávísi landsstýrismaðurin hevur fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina av viðlíkahaldi, renovering, nýbygging, út- og umbygging innan sítt málsøki, meðan landsarkitekturin virkar sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum.

Skipanin, sum hon er í dag, er grundað á siðvenju og óformellar mannagongdir og verður ikki nýtt av øllum stýrum í sama mun. Mælt verður tí til at skipa landsarkitektin sum eina ***miðsavnaða ráðgevarafunksjón*** við greiðum heimildum mótvegis stýrinum, og sum virkar eftir góðkendum mannagongdum. Henda eindin eigur at loysa uppgávur tvørturum stýrini og fyri hvørt stýrið sær, soleiðis at best møgulig samskipan og gagnnýtsla fæst burturúr íløgunum í mun til karmarnir hjá hvørjum stýri.

Eisini verður mælt til at varðveita eina ***byggitekniska eind í stýrinum***, har tað er neyðugt fyri at loysa uppgávurnar á skilabesta hátt. Henda eindin eigur at virka í tøttum samstarvi við miðsavnaðu eindina eftir greiðum reglum um arbeiðsbýti. Endamálið við hesum arbeiðsbýti er at varðveita serkunnleikan í stýrinum, har uppgávurnar eru so stórar, at ein samskipan innanhýsis er neyðug. Eisini merkir hetta, at ikki er neyðugt hjá miðsavnaðu eindini at hava serkunnleika innan øll øki, men at hon kann savna seg um teir byggitekinsku spurningarnar. Sum tað sær út til nú, er tað bert Almanna- og heilsumálastýrið, sum hevur hildi, tað vera neyðugt við eini tílíkari eind í stýrinum.

At enda mælir nevndin til, at arbeiðsuppgávurnar hjá ***eindini á staðnum***, t.d. ein húsavørður, verða heilt greiðar, soleiðis at ivi ikki skal standast av, hvørjar uppgávur hesin hevur ábyrgd av og eigur at loysa, og hvørjar uppgávur miðsavnaða eindin hevur. Hetta er galdandi har, eingin byggiteknisk eind er í stýrinum.

Samanumtikið mælir nevndin soleiðis til, at skipa tann byggifrøðiliga serkunnleikan í tvær ella tríggjar eindir, har størst møgulig gagnnýtsla fæst burtur úr tí serkunnleika, sum einkulta eindin hevur. Hetta merkir, at tað er neyðugt at hava greiðar reglur og mannagongdir fyri arbeiðsuppgávurnar hjá hvørjari eind, men eisini at tað ikki verður

neyðugt at uppbyggja eina stóra miðsavnaða umsiting, sum skal hava serkunnleika innan øll øki.

Nevndin metir, at ein av uppgávunum hjá miðsavnaðu eindini er at gera uppskot til reglur og mannagongdir fyri arbeiðsbýti millum byggiteknisku eindirnar, t.v.s. millum miðsavnaðu eindina og stovnar undir Undirvíngar- og mentamálastýrinum og millum miðsavnaðu eindina og Almanna- og heilsumálastýrinum. Hesin spurningur verður tí ikki viðgjørdur nærri her. Niðanfyri eru endamál, stað, uppgávur og ábyrgd og heimildir sostatt bert lýstar fyri ta miðsavnaðu eindina. Viðmerkast skal, at tá ið Almanna- og heilsumálastýrið hevur eina byggitekniska eind í stýrinum, er tað ikki sami tørvur, sum stýrið hevur í mun til Undirvísingar- og mentamálastýrið. Tí verða uppgávurnar hjá miðsavnaðu eindini býttar í tvey.

## Miðsavnaða eindin

### *Endamálið við eini miðsavnaðari byggitekniskari eind*

Eindin skal veita byggitekniska ráðgeving til øll stýri og tryggja eina byggitekniska umsiting við fakligum førleika á høgum støði og munadygt viðlíkahaldseftirlit við øllum landsins ognum.

Miðsavnaða eindin ger tað møguligt at fáa eitt samlað yvirlit yvir allar landsins ognir og tørvin á viðlíkahaldi. Serliga viðvíkjandi viðlíkahaldi er tað av stórum týdningi, at ráðgevingin er á høgum støði við umhugsni fyri mentan, umhvørvi og nýtslumøguleikum. Eisini eigur eindin at virka fyri samstarvi millum einstøku stýrini, tá ið hølistørvurin broytist og umbýti ella umskipan er ein møguleiki.

### *Hóskandi stað*

Miðsavnaða ráðgevandi eindin kann hóskandi fysiskt verða løgd saman við Landsverkfrøðinginum, sum frammanundan umsitur byggiteknisk mál og hevur førleika á økinum.

Landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av Landsverkfrøðinginum, hevur ikki fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina innan øll tey málsøki, sum miðsavnaða byggitekniska eindin veitir ráðgeving til, men bert ábyrgd av, at eindin virkar í samsvar við endamálið.

### *Uppgávur fyri Undirvísingar- og mentamálastýrið*

Ný- og umbygging:

- Eftirlit við og játtanarstýring av byggiarbeiðum fyri stýrið
- Tilknýti at bygginevndum, sum verða settar í sambandi við størri ný- og umbyggingar
- Tilmæli til landsstýrismannin í samband við áseting av løgukarmi. Hetta verður gjørt í samstarvi við serkøn í stýrinum og eindina á staðnum

Viðlíkahald:
- Eftirlit við og játtanarstýring av byggiarbeiðum fyri stýrið
- Gera avtalur við eindina á staðnum um, hvussu og nær ásetti viðlíkahaldskarmurin skal nýtast
- Tilmæli til landsstýrismannin í sambandi við áseting av viðlíkahaldskarmi. Hetta verður gjørt í samstarvi við eindina á staðnum

Leigumál:
- Byggifrøðiliga ráðgeving í sambandi við nýggj leigumál

Aðrar uppgávur:
- Ummæli av umsóknum um studning til ymisk anlegg. Sýning og góðkenning av somu anleggum.
- Samstarv við fólk í stýrinum um góðkenning av ný- og umbyggingum, har henda uppgávan liggur í stýrinum uttan fíggjarliga og umsitingarliga ábyrgd (t.d. 61 fólkaskúlar)
- Samstarv við Fornminnissavnið um viðlikahald av friðaðum ognum

Tvørgangandi uppgávur:
- Skráseting av landsins ognum og leigumálum
- Gera uppskot til reglur og mannagongdir fyri arbeiðsbýti millum byggiteknisku eindirnar, sum skulu góðkennast av landsstýrismonnunum fyri tey ymsu málsøkini
- Vegleiða og hjálpa stýrunum og stovnar undir tí at finna egnaði høli at virka í
- Virka fyri samstarvi millum stýrini í sambandi við broyttan hølistørv

*Uppgávur fyri Almanna- og heilsumálastýrið*

Ný- og umbygging:
- Møguliga ráðgevings- og konsulentuppgávur fyri aðalstýrið og stovnar í planleggja ný- og umbyggingar, um tørvur er á hesum.

Viðlíkahald:
- Kravsáseting og eftirlit við viðlíkahaldi.
- Møguliga ráðgevings- og konsulentuppgávur fyri aðalstýrið og stovnar, sum gera viðlíkahaldsarbeiði, um tørvur er á hesum.

Leigumál:
- Góðkenna leigusáttmálar

Tvørgangandi uppgávur:
- Skráseting av landsins ognum og leigumálum
- Gera reglugerðir og leiðbeiningar av almennum og ítøkiligum slagi
- Vegleiða og hjálpa stýrunum og stovnum undir tí at finna egnaði høli at virka í

## *Ábyrgd og heimildir*

Tann ávísi landsstýrismaðurin hevur fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina av viðlíkahaldi og nýbygging á sínum málsøki. Hetta framgongur eisini av svarinum frá løgdeildin á Løgmannsskrivstovuni dagfest 23. august 1999, har sagt verður: "Heimildin at ráða yvir ognum, so sum leigu, keyp og sølu, fylgir – umframt at løgmaður hevur lagt málsøki til viðkomandi landsstýrismann – tó framvegis av játtanini frá løgtinginum. Stýrini eru sostatt ikki eigarir sum so, men hava einans rætt til at ráða yvir teimum ognum, ið hoyra stýrinum til. Ábyrgdin av teimum einstøku ognunum verður eftir hesum tætt tengd at rættinum til at ráða, sum aftur framgongur av játtanareglunum".

Byggitekniska eindin staðfestir í sambandi við regluligum bygningssýni viðlíkahaldstørvin fyri allar bygningar hjá landinum, og hevur eftirlit við, at viðlíkahaldið verður gjørt. Eindin raðfestir viðlíkahaldstørvin eftir ávísari flokkingarskipan. Um eitt aðalstýri ikki ger tað viðlíkahald, sum byggitekniska eindin metir er alneyðugt, fyri at bygningarnir ikki forfalla munandi, skal aðalstýrið hava eina frágreiðing um, hvat hendir, um einki verður gjørt, og eina dagfesting fyri, nær ymisk tiltøk eiga at verða gjørd. Verður einki gjørt, má byggitekniska eindin geva sínum landsstýrismanni boð um hetta, og málið verður tá tikið upp politiskt.

Tá samlaða viðlíkahaldsjáttanin er staðfest á fíggjarlógini kann landsstýrismaðurin geva leiðaranum fyri miðsavnaðu eindini ræðisrætt yvir viðlíkahaldsjáttanini. Leiðarin hevur tá ábyrgdina av, at útinna hetta arbeiðið í samstarvi við eindina á staðnum og skal síggja til at játtanin verður nýtt til endamálið.

Í sambandi við løgur er landsstýrismaðurin byggiharri, men kann gera av at leggja hesa uppgávu til miðsavnaðu eindina at umsita. Í hesum førum kann landsstýrismaðurin geva leiðaranum fyri miðsavnaðu eindini ræðisrætt yvir løgujáttanini. Leiðarin hevur tá ábyrgdina av, at útinna hetta arbeiðið í samstarvi við eindina á staðnum og skal síggja til at játtanin verður nýtt til endamálið.

## *Starvsfólk og kostnaður*

Tað vil krevja størru orku enn landsarkitekturin hevur í dag at røkja byggitekniskar uppgávur fyri øll stýri, men um eindin verður løgd saman við Landsverkfrøðinginum, kann hon gera nýtslu av teimum umsitingarskipanum sum eru har. Kanska verður tørvur á einum starvsfólki afturat, men møguliga kunnu onkrar av uppgávunum legjast til starvsfólk hjá Landsverkfrøðinginum. Hesin spurningur eru eitt samráðingarmál millum verandi landsarkitekt og leiðsluna á Landsverkfrøðinginum. Eisini verður víst til, at fleiri uppgávur, sum miðsavnaða eindin kann veita aðalstýrinum, kanska í framtíðini verða bodnar út til privatu vinnuna at røkja og skal starvsfólkatalið sostatt lagast eftir hesum. Mælt verður tí til, at landsarkitektfunktiónin, sum hon er nú, verður løgd saman við Landsverkfrøðinginum og at eingi eyka starvsfólk verða sett fyrr enn ein tíð er farin, t.d. eftir einum ári við tí nýggju skipanini.

## Fyrimunir og vansar

Viðvíkjandi miðsavningini av tí byggifrøðiliga serkunnleikanum eru fleiri fyrimunir. Stórur tørvur er á at fáa skipað viðurskifti fyri tað almenna byggiarbeiðið, sum fer fram, og at faklig ráðgeving er til taks fyri øll stýrini. Tað er ikki neyðugt at hvørt stýri hevur eina byggitekniska umsiting, uttan í serligum førum sum t.d. sjúkrahúsøki, og við einum miðsavnaðum stovni í rætta umhvørvinum er góður møguleiki fyri at uppbyggja eina umsiting á høgum fakligum støði. Serliga kunnu nevnast tær tvørgangandi uppgávurnar, ein tílíkur stovnur kann røkja. Samstundis verður tað eisini ein fyrimunur, at ein stovnur nú fær eina eftirlitsuppgávu viðvíkjandi viðlíkahaldi, soleiðis at viðlíkahaldið ikki framhaldandi verður niðurprioriterað við møguleiki fyri at bygningar farast illa.

Útfrá sjónarmiðnum, at teir fysisku/teknisku karmarnir rundan um virksemi, sum fer fram á einum og hvørjum stovni, hava sera stóran týdning fyri arbeiðið, er tað ein stórur fyirmunur, at ábyrgdin og umsitingin av karmunum eisini liggur hjá tí landsstýrismanninum, sum hevur ábyrgdina av virkseminum. Hervið hevur sami landsstýrismaður ábyrgdina av, at hóskandi høli/umstøður eru fyri stovnin at virka í, og at broytingar í virkseminum og teir fysisku/teknisku karmarnir fylgjast at. Um tað er ein annar landsstýrismaður, sum hevur ábyrgdina av teimum fysisku/teknisku karmunum, er vandi fyri, at ætlaðar broytingar skulu gjøgnum eina stóra og tunga umsiting, áðrenn tær kunnu verða framdar. Eisini kann hugsast, at uttanfyristandandi hava trupult við at síggja tað neyðuga í t.d. at broyta ein bygning útfrá einum námsfrøðiligum sjónarmiði.

Ein avgerandi fyrimunur við einum miðsavnaðum byggitekniskum serkunnleika, sum hevur eina *ráðgevarafunktión*, meðan landsstýrismaðurin hevur fíggjarligu og umsitingarligu ábyrgdina av byggitekniska virkseminum innan sítt málsøki er, at ábyrgd og mynduleiki liggja á sama stað. Um ábyrgdin fyri einum brekið fellur frá einum stovnsleiðara bert hetta verður fráboðað eini byggitekniskari eind, sum hoyrir til ábyrgdarøkið hjá einum øðrum landsstýrismanni enn tí, sum hevur ábyrgdini av virkseminum á stovninum, er stórur vandi fyri at hetta kann elva til trupulleikar. Hugsast kann t.d. at ein stovnsleiðari fráboðar ein leka í einum taki til ein stovn undir einum landsstýrismanni, meðan landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av virkseminum, gevur boð um at steingja stovnin vegna lekan. Spurningurin er, hvør í hesum føri vil hava ábyrgdnina av, at virksemi verður tikið upp aftur á stovninum. Eisini kann hugsast, at landsstýrismaðurin, sum hevur byggitekinsku eindina um hendi, hevur onnur áhugamál t.d. geografisk, enn tey áhugamál, sum landsstýrismaðurin fyri øki hevur. Landsstýrismaðurin fyri málsøkið hevur ábyrgdin av, at tann dagligi raksturin koyrir og hendan árbyrgd *kann ikki* skiljast frá ábyrgdini fyri teknisku og fysisku karmunum.

Verður heimild, ábyrgd og játtan viðvíkjandi byggiteknisk mál flutt frá landsstýrismanninum á einum ávísum øki til ein annan landsstýrismann, verður hetta málsøki meiri ella minni deilt, og tað verður ikki møguligt at hava fulla ábýrgd fyri málsøki. Verður t.d. byggitekniska øki tikið út av sjúkrahúsøkinum, verður ávirkanin hjá landsstýrismanninum í heilsumálum nógv skerd.  Tí verður mett, at tann byggitekniski parturin ikki kann takast burturúr einum málsøki.

Nevndin metir, at spurningurin um, hvussu ein miðsavnaður stovnur skal verða førur fyri at raðfesta bæði viðlíkahald og nýbygging innan øll málsøki á ein objektivan hátt, er sera trupul. Vandi er fyri, at hesin stovnur kemur at liggja sum ein forðing fyri ígongdsetan av ætlaðum virksemi, og at tað fer at krevja alt ov nógva umsiting og langa tíð at avgreiða málini. Eingin ivi er um, at tað almenna byggivirksemi eigur at verða skipað útfrá samfelagsbúskaparligum árinum, men hetta skal gerast á politiskum støði og er ikki ein uppgáva hjá einum stovnsleiðara.

Tórshavn tann 21.10.1999

Undirvísingar- og Mentamálastýrið

Almanna- og Heilsumálastýrið

Løgmansskrivstovan

27 OKT. 1999 12

J. nr.: 300-19/99